# Vanligu viðskiftatreytir okkara

## 1. Avtala millum teg og bankan

Vælkomin í BankNordik, leiðandi peningastovnin í Føroyum.

Missión bankans er at gera tað fíggjarliga møguligt hjá tær at fullnýta tíni evnir og tínar møguleikar. Til tess at nøkta tørvin hjá tær á besta hátt, bjóðar BankNordik eitt breitt úrval av fíggjarligum tænastum.

Hesar viðskiftatreytir innihalda tær høvuðsreglur, ið eru galdandi í samskiftinum millum teg og bankan. Viðskiftatreytirnar galda, um ikki annað er ásett í serstakari avtalu, sum t.d. inn- ella útlánsavtalu, íløguavtalu ella gjaldsmiðlanaravtalu.

## 2. Innsavnan og viðgerð av upplýsingum

**Stovnan av kundasambandi**
Tá ið kundasamband, herundir konta, verður stovnað, skal bankin sambært lóg hava avrit av skjalprógvum við samleikaupplýsingum kundans. Samleikaupplýsingarnar skulu innihalda fult navn, bústað og P-tal/V-tal. Bankin skal eisini frá hvørjum kunda hava upplýsingar um, hvat kundaviðurskiftið fevnir um.

Samleikaprógv fyri fysiskar persónar skal vera við mynd og útgivið av einum almennum myndugleika. Sum dømi um samleikaprógv fyri fysiskar persónar kann nevnast:

- Føroyskt ella ES-pass
- Føroyskt ella ES-koyrikort
- ID-kort við mynd útflýggjað av føroyskum/útlendskum myndugleikum
- Dópsváttan ella navnabræv; tó bert til kontustovnan o.a. hjá persóni, ið er kendur av bankanum
- Sum ískoyti til samleikaprógv kann sygesikringsbevis/P-talskort nýtast

Fyri einstaklingsvirki skal veitast skjalprógv fyri navni og bústaði hjá bæði virkinum og eigaranum. Eisini skal skjalprógv av V-tali og P-tali eigarans latast bankanum.

Fyri løgfrøðiligar persónar, undir hesum fyritøkur, feløg, stovnar og grunnar við bústaði í Føroyum, skal fult navn, bústaður og V-tal skjalprógvast. Harumframt skal avrit av partafelagsútskrift, fulltrúum, viðtøkum, samtyktum og seinasta roknskapi eisini latast bankanum. Umframt hetta skulu nevnd, stjórn og fulltrúar felagsins lata bankanum samleikaprógv.

Fyri løgfrøðiligar persónar, undir hesum fyritøkur, feløg, stovnar og grunnar, ið eru skrásettir í útheiminum, skal bankin eisini hava avrit av skrásetingarprógvi.

**Tagnarskylda**
Starvsfólk bankans hava tagnarskyldu, sum fevnir um øll viðskiftafólk bankans.

Starvsfólk mugu ikki óheimilað lata av hondum ella útflýggja upplýsingar, sum tey í starvi sínum hava fingið kunnleika til.

Víst verður annars til reglurnar um herda tagnarskyldu í lóg um fíggjarfyritøkur.

Starvsfólk kunnu útflýggja upplýsingar til almennar myndugleikar í tann mun, lógarásetingar áleggja hetta. Í hesum sambandi kann nevnast útflýggjan av kundaupplýsingum til TAKS.

Í aðramáta kunnu starvsfólk bankans, í sambandi við fremjan av eini avtalu við teg, t.d. peningaflyting til annan peningastovn, útflýggja tær, fyri fremjanina av hesi avtalu, neyðugu samleikaupplýsingar.

**Samtykki**
Fyri støðugt at kunna veita tær bestu tænastu,kann bankin biðja um samtykki at lata øðrum kundaupplýsingar at brúka til ráðgeving og marknaðarføring. Samtykkið kann altíð broytast ella takast aftur.

**Innlit í viðgerð av persónsupplýsingum í BankNordik**
Tú hevur altíð rætt til at fáa upplýst, hvørjar upplýsingar bankin viðger um teg. Um tú ynskir skrivligt svar, kann bankin krevja eitt tænastugjald.

**Feilir í upplýsingunum hjá BankNordik**
Um bankin verður varugur við, at tað er feilur í upplýsingunum um teg, ella at upplýsingarnar eru villleiðandi, verða upplýsingarnar rættaðar.

**Mótmæli móti marknaðarføring**
Tú kanst altíð boða bankanum frá, at tú ikki ynskir at móttaka tilfar í sambandi við marknaðarførslu av BankNordik.

**Kæra um viðgerð av upplýsingum í BankNordik**
Um tú ert misnøgd/ur við viðgerðina av persónsupplýsingum o.ø. í BankNordik, kanst tú kæra til:

P/F BankNordik
Kærudeildin
Húsagøta 3
FO-110 Tórshavn
Teldupostur: compliance@banknordik.fo

ella

Dátueftirlitið
Tinganes
Postboks 300
FO-110 Tórshavn

## 3. Góðskriving av kontu

Bankin hevur rætt til at góðskriva eina kontu fyri eina og hvørja upphædd, sum bankin móttekur í kundans navni, ella sum bankin sjálvur á ein ella annan hátt skal rinda ella góðskriva kundanum.

Góðskriving og skuldskriving á kontu fær virði í samsvari við tær til eina og hvørja tíð galdandi virðisásetingarreglur bankans (sí punkt 4 og 5).

## 4. Rentur

**Rentutreytir**
Rentan á einstøku innláns- og útlánskontunum er skiftandi, uttan so at annað er greitt avtalað. At rentan er skiftandi merkir, at bankin til hvørja tíð kann broyta rentustigið.

Rentustigið er treytað av kontuslagi, eins og rentustigið á einstøku innláns- og útlánskontum kann vera treytað av tí saldu, sum til hvørja tíð er á kontuni.

Tú kanst fáa upplýsingar um rentustigið, herundir rentuspennið á einstøku inn- og útlánunum í prísbókini, ið liggur frammi í deildum bankans og er at finna á heimasíðu bankans www.banknordik.fo ella við fyrispurningi.

**Broyting av skiftandi rentustigi**
BankNordik kann uttan fráboðan broyta skiftandi rentustigini, um broytingin er til fyrimun fyri teg.

BankNordik kann uttan fráboðan lækka skiftandi rentustigini á innlánskontum og hækka skiftandi rentustigini á útlánskontum, um:

- broytingar í inn- ella útlendskum peninga- ella kredittpolitikki hava týdning fyri BankNordik, tí vanliga rentustigið ávirkast,
- onnur broyting í vanliga rentustiginum, til dømis á peninga- ella lánsbrævamarknaðinum, hevur týdning fyri BankNordik,
- ella broytingar í skattum og avgjøldum fáa týdning fyri BankNordik.

BankNordik kann, við eini fráboðanarfreist á ein mánað fyri privatkundar og 14 dagar fyri vinnukundar, lækka skiftandi rentustigini á innlánskontum og hækka skiftandi rentustigini á útlánskontum, um:

- tey viðurskifti, ið vórðu løgd til grund, tá ið rentutreytir tínar vórðu ásettar broytast,
- BankNordik av handilsligum ávum fremur broytingar í bankans vanligu rentu og prísáseting, uttan at hetta er grundað á gongdina í vanliga rentustiginum. Handilsligar orsøkir fevna m.a. um at náa eini meira gagnligari tilfeingis- og førleikanýtslu ella at bøta um raksturbankans,
- um broytingar í ella tillagingar av kappingar- ella rakstrarumstøðum bankans grunda fyri eini broyting í einum ella fleiri kontusløgum.

Tú fært fráboðan um broytingar í skiftandi rentustigi í brævi, elektroniskt ella umvegis lýsing í føroysku miðlunum.

## 5. Rentuútrokning, rentudagur og rentutilskriving

BankNordik ger dagliga eina útrokning av rentum fyri hvørja einstaka kontu á henda hátt:

- Salda x (áljóðandi rentu)/360 (um ikki annað er ítøkiliga avtalað).
- Allir mánaðir í árinum verða roknaðir sum 30 dagar, um ikki annað er ítøkiliga avtalað.
- Tá ið dagliga saldan verður gjørd upp, tekur BankNordik støði í rentudegnum fyri konturørslurnar.
- Rentudagurin er tann dagurin, tá ið eitt inngjald, útgjald ella onnur konturørsla fær ávirkan á útrokningina av rentum á eini kontu.

Sum útgangsstøði eru niðanfyri nevndu reglur galdandi:

- Tá ið tú fremur inngjøld í reiðum peninginiella við gjaldskorti á eina kontu í BankNordik, er fyrsti arbeiðsdagur eftir inngjaldið rentudagur.

- Tá ið tú fært útgoldið reiðan peningi ella við korti av tíni kontu í BankNordik, er avgreiðsludagurin rentudagur.
- Tá ið tú tekur út við korti ella innanhýsis gjaldskorti í sjálvtøkunum hjá BankNordik, er dagurin, tá ið úttøkan verður framd, rentudagur.
- Tá ið tú nýtir kortið í elektronisku skipanini í handlum, er tann dagurin, tá ið kortið verður brúkt, rentudagur.
- Tá ið tú flytir pening millum egnar kontur í BankNordik, er avgreiðsludagurin rentudagur fyri báðar kontur.
- Tá ið tú fært løn, almennar veitingar o.a. er rentudagurin fyrsti arbeiðsdagur eftir inngjaldið.
- Tá ið tú fært aðrar flytingar frá kontu í øðrum føroyskum peningastovni, er rentudagurin fyrsti avgreiðsludagur, eftir at flytingin er móttikin.
- Leygardagur, sunnu- og halgidagar, flaggdagur, grundlógardagur, ólavsøkuaftan, ólavsøkudagur, jólaaftan og nýggjársaftan eru ikki avgreiðsludagar í BankNordik.

**Rentutilskriving**

Rentan á innlánum verður vanliga tilskrivað hálvárliga. Tað verður gjørt við at leggja dagligu rentuútrokningarnar saman og seta alla upphæddina inn á tína kontu. Dagurin, tá ið renturnar verða tilskrivaðar, er rentudagur.

Rentan á útlánum verður vanliga tilskrivað hvønn ársfjórðing ella hvørt hálva ár. Rentuskeiðið sæst á lánskjølunum.

Rentutilskrivingin fer fram við at leggja dagligu rentuútrokningarnar saman og skuldskriva kontu tína. Dagurin, tá ið renturnar verða tilskrivaðar, er rentudagur.

Rentutilskrivingin er tilskilað á kontuavriti ella aðrari uppgerð.

BankNordik kann gera av, at rentuupphædd undir eina ávísa støðd ikki verður tilskrivað kontuni.

## 6. Tænastugjøld

Bankin tekur sær rætt til at krevja tænastugjøld fyri tænastuveitingar, ið verða gjørdar fyri teg. BankNordik kann eisini rokna sær tænastugjøld fyri at svara spurningum frá almennum myndugleikum. Alt eftir hvørja tænastuveiting talan er um, verða tænastugjøldini antin áløgd sum ein føst upphædd, ein prosentpartur, ella sum ein tímaløn í mun til útinnanina av tænastuveitingini. Útrokningarhættirnir kunnu setast saman.

Vanligu tænastugjøldini eru at finna í bankans prísbók, sum liggur frammi í deildum bankans, og sum sæst á heimasíðu bankans www.banknordik.fo. Onnur tænastugjøld verða upplýst kundum bankans eftir fyrispurningi.

**Broyting av tænastu- og provisiónstreytum**

BankNordik kann, uttan ávaring, fremja lækkingar í provisiónum og tænastugjøldum.

BankNordik kann, við eini fráboðanarfreist á 1 mánað fyri privatkundar og 14 dagar fyri vinnkundar, fremja hækkingar í regluligum provisiónum og tænastugjøldum, ið eru ein partur av einum verandi kundasambandi, um:

- Tær umstøður, ið fastsetanin av provisiónini ella tænastugjaldinum hjá ávísum kunda vóru grundaðar á, broytast.
- BankNordik broytir vanliga gjaldsbygnaðin og prísásetingina av handilsligum orsøkum.Handilsligar orsøkir kunnu m.a. fevna um at náa eini meira gangnligari tilfeingis- og førleikanýtslu ella at bøta um rakstur bankans.
- Um broytingar í ella tillagingar av kappingar- ella rakstrarumstøðum bankans grunda fyri eini broyting í einum ella fleiri kontusløgum.

Fyri verandi kundasambond kann BankNordik av handilsligum ávum, og við eini fráboðanarfreist á 1 mánað, seta í verk tænastugjøld fyri tænastuveitingar, ið BankNordik ikki áður hevur tikið tænastugjald fyri. Fyri vinnukundar er fráboðanarfreistin 14 dagar.

BankNordik kann til eina og hvørja tíð, uttan ávaring, seta í verk og hækka tænastugjøld fyri einstakar tænastuveitingar.

Tú fært fráboðan um broytingar í provisiónum og tænastugjøldum í brævi, elektroniskt ella umvegis lýsing í føroysku miðlunum.

## 7. Trotarenta og eykagjøld

Verða treytirnar fyri kundasambandinum, heilt ella lutvíst, ikki loknar av tær, t.d. um ein konta kemur í óheimilað trot ella eftirstøðu, ella á annan hátt verður nýtt ímóti ásetingunum í avtaluni millum teg og bankan, kann bankin krevja eina ásetta trota- ella eftirstøðurentu, provisión ella morarentu. Harumframt kann bankin krevja gjald fyri áminningarskriv, løgfrøðiliga hjálp o.l. í sambandi við innkrevjing og annað.

Støðdin á gjaldinum fyri áminningarskriv sæst á áminningarskrivinum. Trotarentan o.a. verður upplýst eftir fyrispurningi frá tær.

Trotarenta og trotaprovisión verða ásettar við støði í meting hjá BankNordik um váðan av mishildnum krøvum sum heild, umframt ítøkiliga mishildnum krøvum hjá tí einstaka.

BankNordik kann til hvørja tíð fyrisitingarliga og roknskaparliga velja at steðga rentutilskrivingini á mishildnum krøvum. Hetta merkir ikki, at BankNordik avkannar sær rættin at renturokna kravið og annars krevja gjald fyri útreiðslur, ið seinni eru komnar afturat. Hetta er galdandi uttan mun til, um nevndi

bókingarháttur verður fráboðaður tær á kontuavriti ella líknandi.

## 8. Inngjald og útgjald

**Fyrivarni fyri inngjøldum**
Øll inngjøld á kontu tína, ið ikki fara fram í reiðum peningi, eru við fyrivarni fyri, at BankNordik fær upphæddina. Fyrivarnið er galdandi, hóast tað ikki er nevnt á kvittan ella aðrari kunning um inngjaldið.

BankNordik kann flyta aftur upphædd, sum eyðsæð av misgáum frá bankans síðu er sett inn á tína kontu, t.d. um sama upphædd verður sett inn tvær ferðir.

**Nýtsla av inngjaldi**
Eitt og hvørt inngjald til lán ella kredittir verður fyrst nýtt til at rinda rentu og provisión. Hetta er galdandi, sama um tú sjálv/ur rindar, ella inngjøldini eru frá borgsmanni ella veðsetara. Onnur gjøld verða síðani nýtt til at rinda avdráttir.

**Tillaging av lánsgjaldi**
BankNordik hevur rætt, men ikki skyldu, til at hækka lánsgjaldið, samsvarandi hækkandi rentustøði, provision ella líknandi.

Tá ið tú fært pappírs- ella elektronisk kontuavrit, skalt tú beinanvegin kanna, um rørslur eru á kontuni, ið tú ikki kennist við. Um so er, eigur tú alt fyri eitt at seta teg í samband við BankNordik.

Útskrift frá BankNordik skal til hvørja tíð metast sum galdandi prógv fyri støddina á skuldini.

**Eftirlønarútgjald í sambandi við deyða**
Um tú doyrt, áðrenn eftirlønarsamansparingin er útgoldin, verður samansparda eftirlønarupphæddin útgoldin til næsta avvarðandi, um ikki onnur serlig avtala er gjørd (njótunartilskilan).

Tað ber altíð til at gera serliga avtalu um njótunartilskilan. Avtalan kann gerast, samstundis sum kontan verður stovnað ella seinni. Tað ber eisini altíð til at broyta eina avtalu um njótunartilskilan, um tú ikki við avtalu við triðjamann hevur sagt henda rættin frá tær.

## 9. Uppsøgn, mótrokning og broyting av treytum

**Broyting av avtalutreytunum**
Um serligar treytir eru avtalaðar við teg, eru hesar í skjalinum tilskilaðar undir partinum »serligar treytir«.

Tá ið treytirnar fyri avtaluna við teg verða ásettar, hevur BankNordik lagt dent á samlaða kundasambandið millum teg ogbankan.

Um broytingar verða framdar í samlaða kundasambandinum, ið ikki eru avtalaðar við BankNordik, tekur BankNordik sær rætt til samstundis at broyta avtalutreytirnar.

**Uppsøgn**
Bankin og tú hava rætt til at uppsiga kundasambandið uttan eina fráboðanarfreist, um tú ikki hevur avtalað annað við bankan.

Í sambandi við omanfyri nevndu uppsøgn av kundasambandinum hevur bankin rætt til at siga upp ábyrgdir og borganarskyldur. Bankin hevur eisini rætt til at loysa seg frá øðrum skyldum, íroknað skyldum í fremmandum gjaldoyra, sum BankNordik kann hava átikið sær fyri teg.

Samstundis hevur tú skyldu til at loysa bankan frá øllum skyldum, sum bankin hevur átikið sær fyri teg og um neyðugt veita trygd fyri hesum.

**Mótrokning**
Bankin hevur heimild til, uttan ávaring, at mótrokna øll fallin peningakrøv, sum tú hevur ella fært mótvegis bankanum í eini og hvørji áogn, bæði í føroyskum og útlendskum gjaldoyra, sum tú hevur ella fært móti BankNordik, uttan so at annað er avtalað við BankNordik.

Bankin mótroknar tó ikki í tí parti av løn ella almennari veiting, sum er alneyðug til lívsins uppihald. Bankin mótroknar heldur ikki í innistandandi peningi, sum sambært lóg ella serstøkum sáttmála er tryggjaður ímóti innheinting.

## 10. Ymiskar ásetingar

**Fulltrú**
Tú kanst geva øðrum fulltrú at virka tína vegna mótvegis BankNordik. Ein fulltrú skal vera skrivlig og skal vanliga gerast á fulltrúaroyðublaðnum hjá BankNordik. Fulltrúin hevur gildi, til BankNordik fær skrivlig boð frá tær um, at fulltrúin er tikin aftur ella broytt.

Um tann, ið hevur givið fulltrú doyr, fellur fulltrúin burtur, tá ið BankNordik fær boð um andlátið. Tað merkir, at kontur o.a. hjá tí, ið hevur givið fulltrú verða sperraðar, til skiftirætturin hevur tikið støðu til, hvussu búgvið skal viðgerast.

Gera fleiri kundar avtalu um eina felagskontu, kann hvør av kontueigarunum ráða einsamallur yvir kontuni, uttan so at annað er avtalað. Doyr ein av kontueigarunum, hevur BankNordik heimild til at sperra kontuna fyri at tryggja búgvið hjá tí deyða.

**Elektroniskt samskifti**
BankNordik kann geva tær allar fráboðanir, avtalur, treytir, skjøl v.m., umframt broytingar í hesum, elektroniskt. Hetta hóast tað í avtalum, treytum o.ø. verða nýtt orð sum »skrivliga«, »brævi«, »kontoavrit« og so framvegis.

Tá ið tú móttekur fráboðanir, avtalur, treytir v.m.

elektroniskt, hevur tað sama rættarvirknað, sum tá ið tú mótekur hetta við vanligum posti. Tú skalt sostatt lata upp og kanna tað tilfar, ið verður sent tær elektroniskt, á sama hátt sum við vanligum posti.

BankNordik kann altíð velja at senda tær fráboðanir, avtalur, treytir, skjøl v.m. á pappíri, um BankNordik metir, at hetta er skynsamasti háttur at kunna teg. Um bankin velur hetta, verður einki tænastugjald kravt frá tær.

Um tú ynskir, at BankNordik sendir tær fráboðanir, avtalur, treytir, skjøl v.m. á pappíri við vanligum posti, skalt tú avtala hetta við BankNordik. BankNordik kann krevja eitt tænastugjald fyri at senda tær slík skjøl á pappíri.

**Telefonsamrøður, ið verða bandaðar**
Fyri at kunna skjalprógva innihaldið í ráðgeving/tænastum veittum umvegis telefon, kann BankNordik festa telefonsamrøður á band. Vanliga verða bert samrøður í sambandi við virðisbræva- og gjaldoyrahandil festar á band.

**Handil uttanlands**
Um BankNordik tína vegna skal fremja handlar uttanlands, velur BankNordik eitt handilssamband, um ikki annað er avtalað. BankNordik hevur onga ábyrgd av mistøkum, ið verða framd av peningastovninum, ið verður nýttur ella av kredittvirði teirra.

Um tú hevur goymslu við útlendskum virðisbrøvum umvegis BankNordik, hevur BankNordik ábyrgd av møguligum mistøkum hjá nýtta handilssambandinum og av kredittvirði teirra, uttan so at tú sjálv/ur hevur valt handilssambandið.

Útlendskar rættarreglur, siðvenjur og viðskiftatreytir kunnu vera rættiliga ólíkar teimum, sum eru galdandi í Føroyum. Í tann mun BankNordik er lógarbundin av útlendskum rættarreglum, siðvenjum ella viðskiftatreytum, eru hesar eisini galdandi fyri teg.

**Kærur**
Um tú ynskir at kæra um BankNordik, skalt tú í fyrstu atløgu seta teg í samband við tína deild.

Um tú eftir hetta framvegis ert ósamd/ur við BankNordik í viðgerðini av tíni áheitan ella úrskurðinum, kanst tú seta teg í samband við kærudeild bankans. Adressan er: P/F BankNordik, Kærudeildin, Húsagøta 3, FO-110 Tórshavn, teldupostur: compliance@banknordik.fo.

Um tú metir, at tín áheitan ikki hevur við sær eina nøktandi loysn, kanst tú velja at senda eina kæru til Peningastovnskærunevndina. Tað er bert gjørligt at kæra um mál, ið eru íkomin eftir 1. januar 2011. Adressan er: Pengeinstitutankenævnet, Amaliegade 8 B, 2. sal, Postboks 9029, 1022 København K, tlf. +45 35 43 63 33, heimasíða: www.pengeinstitutankenaevnet.dk

Vanliga viðger Peningastovnskærunevndin bert kærur frá privatkundum.

**Endurgjaldsskylda**
BankNordik hevur endurgjaldsskyldu, um bankin orsakað av mistøkum ella vanrøkt ikki heldur avtalaðar skyldur til tíðina ella á ófullfíggjaðan hátt.

Sjálvt á teimum økjum, har herðandi ábyrgd er galdandi, hevur BankNordik ikki ábyrgd av tapi, orsakað av:

- Óvirknum/vantandi atgongd til KT-skipanir ella skaða á dátur í hesum skipanum, sum kunnu setast í samband við niðanfyristandandi tilburðir, uttan mun til um tað er bankin sjálvur ella ein uttanhýsis veitari, sum stendur fyri rakstrinum av skipanunum.
- Brek í bankans streymveiting ella telesamskifti, lógarinntriv ella yvirvaldsfyriskipanum, náttúruvanlukkum, kríggj, uppreistri, borgarligum ófriði, sabotasju, yvirgangi ella herverki (undir hesum telduvirus og innbrot í teldukervið), verkfalli, verkbanni, handilsbanni ella stongsli, uttan mun til um stríðið er vent ímóti ella sett í verk av BankNordik sjálvum ella bygnaði bankans, og uttan mun til orsøkina til stríðið. Hetta er eisini galdandi, tá stríðið bert rakar ein part av bankanum.
- Aðrar umstøður, sum eru uttanfyri ávirkanina hjá BankNordik.

Ábyrgingarfrælsi hjá BankNordik er ikki galdandi, um:

- BankNordik frammanundan skuldi havt verið varugur við tey viðurskifti, sum eru orsøk til tapið, tá avtalan varð gjørd, ella skuldi havt forðað fyri ella bast orsøkini til tapið.
- Lóggávan undir øllum umstøðum gevur BankNordik ábyrgdina fyri teimum viðurskiftum, sum eru orsøk til tapið.

**Kunngerð um góðan sið fyri fíggjarligt virksemi**
Bankin er fevndur av »Bekendtgørelse for Færøerne om god skik for finansielle virksomheder«.

Gjørt verður vart við, at BankNordik í summum førum fær provisión ella aðra samsýning, tá ið víst verður til ella seldar verða tænastur hjá samstarvsfeløgunum, til dømis í sambandi við realkredittlán, íløguprógv og tryggingar. Til ber at lesa kunngerðina um góðan sið á heimasíðuni hjá Fíggjareftirlitinum, www.finanstilsynet.dk.

**Trygdargrunnurin fyri innskjótarar og íleggjarar**
Sum kundi í bankanum ert tú gjøgnum Trygdargrunnin fyri innskjótarar og íleggjarar í ein ávísan mun tryggjað/ur ímóti tapi, um bankin fer á húsagang ella í gjaldssteðg.

Trygdargrunnurin svarar fyri m.a. navnamerktum innláni í bankum, við eini upphædd svarandi til mótvirði av 100.000 evrum fyri hvønn innskjótara. Pensjónskontur og barnauppsparingar svarar hann fyri uttan avmarking í upphæddini.

Trygdargrunnurin svarar eisini fyri, um tú sum íleggjari fært eitt tap, av tí at tín banki ikki kann útflýggja tær virðisbrøv, sum bankin hevur í varðveitslu, stendur fyri ella umsitur. Tað verður endurgoldið upp til mótvirðið av 20.000 evrum. Tú kanst fáa meira kunning um Trygdargrunnin fyri innskjótarar og íleggjarar í faldara frá grunninum. Faldarin kann bíleggjast á heimasíðuni www.garantifonden.dk.

**Eftirlit**
BankNordik er undir efitrliti av: Finanstilsynet, Århusgade 110, 2100 København Ø, Tlf. 33 55 82 82, www.finanstilsynet.dk.

**Serreglur**
Gerast skal vart við, at serligar reglur eru galdandi fyri rembursinnheinting, diskonterings og uttanlands viðurskifti, umframt fyri aðrar serkontur. Somuleiðis verður víst til galdandi reglur fyri deildir bankans, ið hava boks, goymslu og umsiting.

**Gildiskoma**
Viðskiftatreytir bankans eru galdandi frá 19. september 2016. Hetta er eisini galdandi fyri kundafyrivarni, ið tikin eru fyri hendan dag, tá ið nýggju treytirnar koma í staðin fyri verandi reglur.

**Broyting av vanligu viðskiftatreytunum**
Vanligu viðskiftatreytir bankans kunnu broytast uttan eina fráboðanarfreist, um broytingin er til fyrimun fyri teg. Vanligu viðskiftatreytir bankans kunnu broytast ella nýggjar verða settar í gildi við eini fráboðanarfreist á ein mánað, um broytingin ikki er til fyrimun fyri teg. Fyri vinnukundar er fráboðanarfreistin 14 dagar.

Tú fært fráboðan um broytingarnar í brævi, elektroniskt ella umvegis lýsing í føroysku miðlunum. Í fráboðanini verður víst til, hvar á bankans heimasíðu tú kanst lesa tær nýggju viðskifta-treytirnar.

Lesið meira um P/F BankNordik á heimasíðu bankans: **www.banknordik.fo**